LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Starvsmannafelagið
Stílað Selmu Ellingsgaard, forkvinnu
Postsmoga 165
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 04. apríl 2013
J.Nr.:28/ 201300018 / 4
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Viðvíkjandi klagu tygara, dagfest 18. februar 2013.**

Eg havi nú lisið klagu tykkara um avgerðina hjá Innlendismálaráðnum, har Innlendismálaráðið í niðurstøðuni m.a. sigur, at tað ikki er brot á nakra almennrættarliga grundreglu, at eitt alment starv ikki verður lýst leyst.

Upprunin til málið er, at Stavsmannafelagið klagaði til Innlendismálaráðið um, at Klaksvíkar kommuna í sambandi við bygnaðarbroytingar í kommunalu fyrisitingini m.a. ikki lýsti starvið sum trivnaðarstjóri leyst at søkja, men setti táverandi kommunustjóran í starvið. Áskoðanin hjá felagnum er, at hetta brýtur við eitt alment viðurkent fyrisitingarligt prinsipp um, at øll almenn størv eiga at lýsast leys, soleiðis at allir borgarar á jøvnum føti fáa rætt at søkja tey.

Innlendismálaráðið metti seg ikki hava heimild at viðgera klaguna, og í avgerð síni, dagfest 15. februar 2013, grundgevur Innlendismálaráðið m.a. við, at prinsippið um at øll størv skulu lýsast leys ikki er lógarfest, og kann heldur ikki metast at vera ein almennrættarlig grundregla.

Sambært § 6, stk. 4 í umboðsmanslógini (løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000) tekur umboðsmaðurin sjálvur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í einum máli, sum klagað verður um.

Eftir at hava lisið klagu tygara og skjølini, skal eg boða tygum frá, at eg ikki haldi grundarlag vera fyri at gera meira við klagu tygara.

Hesa fatan byggi eg fyrst og fremst á, at Innlendismálaráðið hevur ikki viðgjørt avgerðina hjá Klaksvíkar kommunu um at flyta táverandi kommunustjóran í starvið sum trivnaðarstjóri.

Innlendismálaráðið hevur hinvegin tikið støðu til, at Innlendismálaráðið sum kommunalur eftirlitsmyndugleiki hevur ikki heimild at viðgera klaguna frá Starvsmannafelagnum.

Hesa avgerð havi eg onga orsøk at finnast at.

Í øðrum lagi eri eg samd við Innlendismálaráðið, tá sagt verður, at kravið um at øll almenn størv eiga at verða lýst leys ikki er at meta sum ein fyrisitingarlig grundregla á sama hátt sum t.d. líkskaparreglan og proportionalitetsprinsippið, sum Innlendismálaráðið eisini vísir á í avgerð síni.

Tá hetta er sagt, so kunnu myndugleikar ikki generelt lata vera við at lýsa størv leys, og tað er eitt grundleggjandi krav í sambandi við starvssetanir, at almennir myndugleikar skulu stremba eftir at seta best egnaða umsøkjaran í starv. Hinvegin er tað tó ein sannroynd, at starvsfólk í sambandi við bygnaðarbroytingar undir ávísum umstøðum mugu tola broytingar í starvsinnihaldinum og at verða flutt í onnur størv, umframt at myndugleikar í slíkum førum kunnu manna størv við verandi starvsfólkum, heldur enn at siga starvsfólkunum úr starvi.

Eg skal gera vart við, at generellu viðmerkingarnar omanfyri ikki eru ein støðutakan til avgerðina hjá Klaksvíkar kommunu í ítøkiliga málinum.

Avrit av klagu tygara og hesum skrivi er sent Innlendismálaráðnum til kunningar.

Vinaliga

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður